# heima í Havn



*Áarstova stóð ovast í Gongini - beint yvir av Dandastovu, har sum Gullhornið er í dag. Hon er tikin burtur tíðliga í síðstu øld, kanska í tjúgunum. Valla nakað núlivandi menniskja man minnast hana. Men undir hesi lon vuksu áarstovubrøðurnir Hans Andreas og Janus Djurhuus upp.*



*Oman gjøgnum Gongina: Vinstru megin síggjast stovurnar, sum hvurvu, tá Sjóvinnubankin varð bygdur í 1932: Ísaksstova (sæst ikki á myndini), við Stein, Dávastova, í Dali, hjá Petur í Gong, Áspustova og Willumstova. Høgrumegin sæst Bókhandilin og í Køk.*



*Í Nýggjustovu varð Beinta - ella Barbara, sum Jørgen-Frantz Jacobsen kallar hana, fødd í 1667, og her vaks V. U. Hammershaimb upp góða hálva aðru øld seinni*

fór skjótt at lesa latín við honum. Fyrsti maður á amtsskrivstovuni, tann sera dugnaligi hvalbingurin Jens Davidsen, lærdi dreingin at skriva, og hann var settur í Havnarskúla.

Presturin í Havn, Kristen Pram Gad, sum seinni bleiv verfaðir hansara, las eina tíð við Vensili.

Hammershaimb hevði sjálvsagt eisini samband við ommubeiggjan, Jens Christian Svabo, sum tá var gamal og sjúkligur. Men hann fekst tó framvegis við at skriva upp føroysk orð og føroysk kvæði. Hóast Vensil bert var fimm ára gamal, tá Svabo doyði, segði hann seg væl minnast ommubeiggjan siga frá.

Í 1831, tá Vensil var 12 ára gamal, fór hann til Keypmannahavnar at ganga í skúla. 20. oktober 1831 fara hann og mamman avstað við konguliga handilsskipinum.

Men ferðin var drúgv. Ódnarveður brast á, og skipið mátti fleiri ferðir leggja inn, og tað kom ikki leiðina fram til Danmarkar fyrr enn 26. februar 1832 – góðar fýra mánaðir seinni.

Hammershaimb fór fyrstu ferð heim til Føroya at ferðast í 1841. Hann ferðaðist saman við Pløjen, amtmanni um landið og savnaði saman føroysk fólkaminni.

Í 1855 gjørdist V. U. Hammershaimb prestur í Kvívík.

Í 1862 flutti hann inn á Nes í Eysturoy og gjørdist próstur í 1867. Í 1863 lat hann nýggjan prestagarð byggja, sum konan hevði teknað.

Hann sat á Løgtingi í trý skeið og flutti í 1878 við konuni til Danmarkar at búgva.

Men hann vildi fegin vitja

*Framhald á næstu síðu*



*Niðan gjøgnum Gongina. Ein smádrongur kemur við leypi á baki. Vinstrumegin Nýggjastova, høgrumegin Fútastova, Vertshúsið, Knútsstova og omanfyri hómast Áarstova. Í baksýnið sæst Amtmansborgin*